Fróðskaparrit 45. bók komin

45. bók av Fróðskaparrit er júst útkomin. Í bókini eru 7 vísindaligar greinar, skrivaðar av føroyskum og útlendskum vísindafólki. Evnini í nýútkomna ritinum fevna um málfrøði, siðsøgu, fornfrøði, plantuvísindi og lívfrøði.

Nøvn á seyða- og gásalitum
Tollakur Djurhuus hevur savnað og skipað nøvnini á seyða- og gásalitum eftir litskipan, sum Dánjal Jákup Mortensen seyðamaður í Øravík nýtti at kenna seyðin eftir. Afturat hesum skipaða yvirliti er ein listi yvir seyðaskipan, við upplýsing um hvussu vorðin ærin og mamman vóru, og hvussu nógv lomb komu undan. At enda í greinini er ein samsvarandi listi við nøvnunum á gásalitunum.

Mukn
Hjalmar Petersen viðger í stuttar grein orðið »mús«, við støði í armenska orðinum *mukn*.

Rannsóknin í Uppistovubeitinum
Fornfrøðin hevur ein týðandi leiklut innan føroyska gransking. Í Fróðskaparriti 43. bók greiddi Símun V. Arge fornfrøðingur frá um *Mergsogin bein*, ið er ein aldargamal matsiður. Hesi bein vórðu funnin undir fornfrøðiligari rannsókn í Uppistovubeitinum í Leirvík, sum greitt verður frá í yvirlitsgrein í hesi útgávu av Fróðskaparriti. Frágreiðingar frá hesi rannsókn eru ætlaðar at verða prentaðar í Fróðskaparriti, so hvørt rannsóknarúrslitini eru tøk.

Kannubjølluvísa til matna
Í grein nevnd Field Horsetail (Equisetum arvense) as a food plant, greiðir Ingvar Svanberg frá Uppsala Universiteti frá, hvussu fólk í Evropa hava brúkt *Kannubjølluvísu* til matna. Hugskotið til greinina fekk Ingvard Svanbert eftir at hava lisið bókina »Forsøg til en beskrivelse over Færøerne« eftir kvívíksprestin Jørgen Landt, sum kom út í 1800.

Eitt ár hjá sandmaðki
Sandmaður hevur altíð volt fiskaátarum og -útflytarum stórt høvuðbrýggj. Í greinini *Seasonal changes in the infection of young saithe, Pollachius virens, with Anisaks simplex and other helminths* viðger Dánjal Petur Højgaard árligu ringrásina hjá sandmaðki, sum eisini legst á seið.

Mysidur – krabbaverur
Biofar verkætlanirnar hava havt við sær, at Føroyar hava fingið eina fasta havlívfrøðiliga granskingarstøð í Kaldbak, sum er av alstórum týdningi fyri havlívfrøðiligu granskingina, og Fróðskaparrit hevur lovað at hýst greinum frá teimum. Ta fyrstu greinina av hesum slag hava Torleiv Brattegard og Kenneth Meland skrivað. Hon nevnist *Mysidacea (Crustacea) in the Faroe area.* Í hesi grein verður greitt frá einum ávísum bólki av krabbaverum. Av nøkrum av teimum sermerktu mysidunum eru tekningar prentaðar saman við greinini, og útbreiðslan á landgrunninum er víst á kortum.

Yvirlit yvir firvaldar
Seinastu 10 árini hevur tann í Føroyum føddi Aarhus-tannlæknin Svend Kaaber savnað firvaldar her á landi. Tað er eydnast honum at finna 51 sløg, sum ikki eru skrásett her áður. Bæði í Fróðskaparriti 41. bók og 44. bóks vórðu greinar eftir Svend Kaaber um firvaldar. Í bóklinginum *An annotated list of Lepidotera in the Faroe Islands* hevur hann savnað øll tey 108 sløgini í ein yvirlitslista.

Doktari í føroyskum evni
Fróðskaparrit er einasta vísindaliga tíðarrit í Føroyum. Saman við teimum meira lættlisnu tíðarritunum *Frøði, Máltingi* og *Fiskirannsóknum* speglar Fróðskaparrit ein part av tí, sum fíggjarligu játtanirnar til stovnarnar á Debesartrøð hava við sær. Hetta kemur best til sjóndar í greinarstubbanum Scientific publications about the Faroe Islands, 1996, sum fevnir um flestu greinarnar frá 1996. Aftur at hesum verður í brotinum News and Progress umrøddur tann einasti, sum í 1996 gjørdist doktari í einum føroyskum evni, havfrøðingurin Knud Simonsen av Eiði, sum dagliga starvast á Nansen stovninum í Bergen.

Loysir seg at gerast haldari
Fyri einans 47 oyru um dagin fært tú innlit í tað nýggjasta, ið fer fram innan vísindaliga granskning í Føroyum. Fróðskaparrit kemur út einaferð um árið, og tað árliga haldaragjaldið er kr. 165. Í leysasølu er kostnaðurin kr. 195 fyri ritið. Nýggir haldarar kunnu tekna seg á Setursskrivstovuni, handan Á 5, 100 Tórshavn - tlf.: 15302, fax: 18929
e-postur: univadm@fsf.fo.

Tiltøk

KFUK og KFUM, Tórshavn
Mikukvøldið kl. 20 hittast Varðmenn í KFUM.
Jólahugni verður hóskvøldið kl. 19.30 í KFUK.
Opið hús hvørt fríggjakvøld í KFUM frá kl. 21-1.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 møti. Óla Jákup G. Hansen luttekur.
Sunnudagin kl. 16 jólafest fyri børnum.
Øll eru vælkomin.

Havnar kirkja
Bjarni Bæk hevur danska jólagudstænastu (militer) fríggjadagin 12. des. kl. 10.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20.30: Møti.

Ebenezer, Tórshavn
Sunnudag kl. 12: Sunnudagsskúli. Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti. Sunnukvøld kl. 21: Útimøti.
Mánakvøld kl. 20: Bønarmøti.
Mikukvøld kl. 20: Uppbyggingarmøti.
Hóskvøld kl. 20.30: Ungdómsmøti.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Mikudagin kl. 17: Club 7 up.

Lívsins Orð
Møti verður hóskvøldið kl. 20 við evangelistinum Óla Jákup Gaard Hansen.
Barnamøti verður leygardagin kl. 17.
Møti verður sunnumorgunin kl. 10.30.

Samkoman Sion, Vágur
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 73777.

AA-fundur
Sporafundur verður í kvøld kl. 20 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Al Anon, Tórshavn
Fundir fyri avvarðandi av alkoholikarum eru hvørt týskvøld og hvørt hóskvøld kl. 21 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Amnesty International Føroya deild
Skrivstovan er opin:
Týsdag kl. 8.30–12.30
Hósdag kl 8.30–16.30

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til kl. 15.00.
Tlf. 1.7597, skrivitlf. 1.6929
fax 1.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo

Javni
N. Finsensgøta 32
Skrivstovan er opin:
Mikudag kl. 14–16, hósdag kl. 14–17 og fríggjadag kl.14–16.
Tilhaldið er opið 1. fríggjadag í hvørjum mánaði kl.14.30–16.30.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 13978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 19793, Mari Johannesen.

Felagið Føroyar-Kuba
Opið er á skrivstovuni í Kongagøtu 11, mikudag kl. 16-18. Mánad., týsd., hósdag og fríggjad. kl. 10-11. Tlf. 13016 - Fax 13824.

Sjómansheimið »Ørkin«
Brautarholt 29,
105 Reykjavík
Sunnudag møti kl. 17.
Mánakvøld bibliutími kl. 20.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Nærri upplýsingar á tlf. 009 354-568-0777

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49, bert 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1,6, 14, 16, 28 steðga nærhendis. Øll kunnu vera við. Fleiri upplýsingar við at venda sær til Atla Rasmussen, tlf. 32886727, ella John Petersen, tlf. 36789046.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49.
Fríggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur.
Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting. Sunnudagsskúlin byrjar aftur, tá skúlarnir byrja.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
Samkoman Malta í Hirtshals

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 31 23 15 87
Fax 31 23 15 18
Kunningartlf. 31 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.
Kaffistovan er opin frá kl. 14-19 hvønn dag uttan leygardag. Mánadag kl. 17–19 er Dagur og Vika o.a. Týsdag kl. 17.30 er døgurði. Føroysk bløð liggja frammi. Døgurðamatur, fløgur, bond, bøkur og ullvørur eru m.a. at fáa á kaffistovuni.
Ráðgevingin: Tlf. 31 23 99 80, Fax 31 23 92 34 er opin mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30–15.30. Mikudag kl. 14–18.
MFS, Tlf./fax 33250210 Opið mikudag og fríggjadag kl. 16–18.
Øyggjaskeggi, tlf./fax 31232310.
Nærvarp Okkara, tlf. 31228401.
Skúlin, 53681757.

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille Kongensgade 10B
9000 Aalborg
Tlf. 98 13 63 30
Húsið er opið:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 17-19.
Leygardag frá kl. 22-03.
Føroysk bløð liggja frammi, fríggjadag eisini Dagur og vika.
Hvønn sunnudag kl. 17 er kórvenjing í húsinum.
Hvønn týsdag er føroyskur skúli fyri børn á Herningvejskole.
Í høllini á Filstedsvejensskole: Týskvøld og hóskvøld hondbóltsvenjing fyri menn og kvinnur. Fríggjakvøld kl. 18-20 innandura fótbóltur.
Nærri boð um tiltøk og tíðir á tlf. 98 15 38 78.

Føroyingafelagið í Árhus
Vestergade 48 D,
8000 Århus C
Áarstova er opin mánad.–hósdag kl. 16-18.
Fríggjakvøld kl. 21-03, atgongumerki fyri ikki limir 10 kr.
Føroyskur skúli fyri børn leygardag, ólíka vikur, frá kl. 11.00 til 14.00.

V4-tølini
í drátti nr. 1215
5. desember 1997

Tølini: 95 - 70 - 54 - 55 - 28 - 19 - 49 - 0 - 34 - 92 - 35 - 76 - 78 - 79 - 1 - 94

Vinningur: 70.564,- kr.
Vinnarar: 5 vinnarar
Snarseðil nr. 297824 í Klaksv.
Snarseðil nr. 301228 í Fuglaf.
Snarseðil nr. 282205 í Saltangará
Snarseðil nr. 282376 í Saltangará
Snarseðil nr. 288365 í Tórshavn

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Innandura fótbóltur í Bellevue høllini leygardag kl. 19.
Innandura fótbóltur í Hasselager Skole frá kl. 15-17.
Styrkivenjing og motión í Vorrevangsskolen hósdag kl. 18-19.

DUSINO
Vika 49 - 7. des.
Vinnaratøl: 3 - 4 - 6 - 7 - 8 - 12 - 13 - 16 - 18 - 20 - 23 - 24

12 í sama punti: Ongin vinnari
11 í sama punti: 3.688,- kr.
10 í sama punti: 122,- kr.
9 í sama punti: 29,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



Vika 49 - 6. des.
Vinnaratøl: 05 - 08 - 15 - 17 - 28 - 29 - 31
Eykatøl: 19 - 35

7 vinnaratøl: 1.340.300,- kr.
6 vinnarat.+1 eykat.: 41.653,- kr.
6 vinnaratøl: 2.916,- kr.
5 vinnaratøl: 119,- kr.
4 vinnaratøl: 30,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



TIPS-úrslit
Vika 49
6., 7. & 8. nov.

1. Aston Villa–Coventry 1
2. Blackburn–Bolton 1
3. Derby–West Ham 1

4. Leeds–Everton X
5. Leicester–Crystal Palace X
6. Newcastle–Arsenal 2

7. Tottenham–Chelsea 2
8. Bury–Middlesbrough 2
9. Manch. C.–Wolverhampton 2

10. Norwich–Sheffield U. 1
11. Nottingham F.–Bradford X
12. Queens P. R.–Sunderland 2
13. West Bromw.–Stockport 1

Prognosa
13 rætt: 49.650,- kr.
12 rætt: 1.160,- kr.
11 rætt: 167,- kr.
10 rætt: 33,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Brúdleyp

Leygardagin 3. januar kl. 17.00 giftast í Bíggjar kirkju Anita Persson úr Sørvági og Tróndur Niclasen úr Bø.

Brúdleypsveitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitslu, biðjast vinarliga siga frá á tlf. nr. 32745 ella 32269 áðrenn 10. desember.